# Kórleiðarin Ólavur Hátún til áminnis

Í úti við hálva øld var Ólavur Hátún sjálv ímyndin av føroyskum kórsangi og slóðbrótandi kórleiðarin hjá einum hinum besta kórinum í føroysku tónleikasøguni. Útvarpskórið og seinni Havnarkórið hevði við honum sum leiðara nátt málum, sum verða meira enn torfør at gera honum eftir.

Longu áðrenn Ólavur Hátún í januar 1966 á fyrsta sinni stjórnaði Útvarpskórinum, tað, sum seinni varð til Havnarkórið, hevði hann í áleið 20 ár fingist við kórsang. Tí var tað ikki nakar óroyndur kórleiðari, sum Útvarp Føroya fekk at fáa í lag upptøkur av føroyskum sangi til tað unga útvarpi. Tann týdning Útvarpskórið og Ólavur fingu fyri føroyskan kórtónleik eigur ikki at verða undirmettur. Ein av orsøkunum til stóra áhugan fyri kórsangi í Føroyum í 1960'inum og fram til dagin í dag er uttan iva júst úrslit av, at tað í Føroyum hevur eydnast at byggja brúgv millum tann fólksliga sangin og kórtónleikin. Við Útvarpskórinum kom føroyskur kórtónleikur út í hvørja stovu í Føroyum. Sjálvt um samstarvið við Útvarp Føroya helt uppat og kórið í 1973 skifti navn til Havnarkórið, so helt kórið fram sum tónleikaligt lokomotiv í føroyskum kórsangi. Serliga skula nevnast samstarvið sum kórið hevði við donsku tónlistamenninar Karl Clausen og Vagn Holmboe. Tann fyrri ríkaði siðbundnan føroyskan sang við einari rúgvu av einastandandi kórútsetingum, sum nærum allir kórsangarar duga og hin seinni er at meta sum sjálv byrjanin til nýggjari føroyskan kórtónleik.
Ólavur Hátún stjórnaði Havnarkórinum í heili 48 ár og sum oftast var kórið mannað við teimum allarbestu sangarum í landinum. Hetta gjørdi eisini, at Ólavur og kórið hava kundu sett sær so sera høg mál øll árini. Ólavur útlegði tónleikin við klangi og fraseringum, soleiðis at tú ongantíð varð í iva um at hetta var Havnarkórið stjórnað av Ólavi Hátún.
Mongu uttanlandsferðinar við Havnarkórinum fara sangarar helst seint at gloyma. Kórið hevði sína fyrstu uttanlandsferð til Íslands í 1969 og seinni vóru konsertferðir til øll Norðurlond, til Onglands, Skotlands, Fraklands, Eysturríkis, Kekkia, Russlands og eisini um Atlantshav yvir til USA. Ólavur hevur sum einasti føroyingur staðið á so legendariskum podinum, sum í Golden sale í Musikverein í Wien og í Carnegie Hall í New York, umframt á øllum teimum stóru pallinum í norðanlondum.
Ólavur hevði stórt tónleikaligt netverk kring Norðurlond og Evropa og tí fekk hann mangt í lag. Í tí viðfangi er serliga vert at nevna sveitsiska dirigentin Willi Gohl, ið stjórnaði Havnarkórinum til framførslur av størri klassiskum verkum. Hesin íblástur gav Ólavi og kórinum áræði til í fleiri ár at hava ta siðvenjun, annað hvørt árið, fram móti jólum, at framføra Jólaoratoriið hjá Bach ella Messias hjá Händel.

Í Føroyum ganga kórsangur og felagssangur ofta hond í hond. Úr hesum spratt felagssangurin á ólavsøku. Ólavur, Jóannes Nolsøe og kórsangarar byrjaðu í 60'inum tað siðvenju, sum í dag, hjá mongum er eitt hæddarpunkt á ólavsøkuni, nevnuliga felagssangin á Vaglinum. "Hetta er løtan" segði Ólavur mangan tá 1000 tals ólavsøkugestir sungu av øllum alvi. Eftir hansara tykki vóru sangur

og ólavsøka tann blandingin, sum fekk kensluna av føroyskheit at blóma. Tí mundi Ólavur eisini leggja so stóra orku í Ólavsøkukórið, sum hann man hava stjórnað, oftari enn nakar annar.
At fáa kórsangarar kring landið at savnast metti Ólavur at hava alstóran týdning. Kórsangur avmarkar seg jú ikki til ávísar bólkar í samfelagnum, men er samansettur av einum breiðum skarða av føroyingum. Við at syngja í kóri fáa fólk, sum annars ikki fáast við tónleik, høvi at luttaka í smærri og størri tónleikaframførslur. At syngja í kóri er hjá nógvum sjálvur gluggin inn í tónlistarliga heimin. Árligu Kórstevnunar, sum síðani 1967 hava verið hildnar kring landið og sum Ólavur mangan legði nógva orku í, hava júst hetta sum eitt aðalmál.
Musikkskúlin í Føroyum er eisini ein av varðinum, sum standa eftir Ólav Hátún. Sum undangongumaður og fyrsti stjóri, legði Ólavur saman við øðrum lunnar undir tað blomstrandi tónleikalív, sum musikkskúlanir kring landið lívga okkara mentunarlívið við.

Fyri mánaða síðani skipaði Ólavur fyri stórfingnari sangløtu í kirkjubømúrinum. Hetta bleiv hansara seinasta konsert og til tað síðsta hevði hann ætlanir, og hevði hann livað, hevði hann uttan iva hevði sett í verk. Tí soleiðis var hann.

Ærað verið minni um Maistro Ólav Hátún

Leif Hansen